# Sverra ríma

Í Kirkjubø ein skúli stóð,
á egnu grund var settur,
og mangan góðan mann  uppdró,
var høgt í heimi mettur.
*Men hvat dugi eg,*
*sum alvegis fjónaður eri.*

2. Upp vaks Sverri í Kirkjubø,
á skúlanum har hann lærdi.
At skúlin stóð á so tryggum støð',
tað fáur maður vardi.

3. Í Kirkjubø ein høgan veg
á skúlanum Sverri gekk,
var føroyingur líka sum tú og eg,
men ólíka læru fekk.

4. Hann lærdi Vulgata og brøvini øll,
latínska lóg og rættir.
Til hermannaleikir hann fór um vøll,
vit sakna teir dýru skattir.

5. Hann fór til fjals á høgan knút,
seg upp um ennir krøkti.
Hann gjørdi bátar, róði út
og bjargafuglin søkti.

6. Hann hevði ikki verið av Føroya jørð,
men so gott hevði hann treysti,
at hann tók Noregi inn við svørð,
bleiv kongurin ein hin besti.

7. Noregi tók hann við harraskjold,
tað var hann borin at arva,
og Erling skakki, sum stýrdi við vold,
hann mátti nú springa av knarva.

8. Erling skakki, sum tiltikin var
so víða, sum kringlan var drigin,
tá honum saman mót Sverra bar,
hvørja ferð bleiv hann sligin.

9. Í havið leyp Magnus Erlingsson,
hann skuldi mót Sverra herja,
og Valdimar sigur í donsku lon
var ikki maður at verja.

10. Tann danska flotan við valdum lið
teir tvær ferð mót Sverra sendu.
Har summir fullu, hann summum gav grið,
so hámir teir heim aftur vendu.

11. Tá ið Magnus og Erling høvdu lívið spilt,
ilt var við at gera,
hann Svína-Petur tey boð so snilt
læt fram í Bergen bera.

12. Tíðin hon goymdi teir viðgitnu menn:
Sverra og Svína-Petur.
Tó nælir her grønskan í Føroyum enn,
nú grør eftir langan vetur.

13. Tit, føroyingar, minnist og gevið ans
og fedrarnar ikki svíkið!
Í Føroyum ein kongur er vaksin til mans,
og fáur var hansara líki.

J.P. Gregoriussen, Jóan Petur uppi í Trøð (1845-1901) yrkti. Vísan stóð í Føroyingatíðindi nr. 1, 1896 og seinni í Føroya fólks songbók. Í 1928 komu yrkingar hjá IPG út í bók: YRKINGAR, sum M.A. Jacobsen legði til rættis. Har eru onkrar heilt smáar broytingar gjørdar í Sverra rímu, og tær broytingarnar eru tiknar við her – umframt at onkur gomul staving er dagførd. Lagið er Herr Sinklar. jd.